
5


6

1 Arbeiðið at byggja saltsiloina á Drelnesi byrjaði í 1937 og var liðugt árið eftir

2 Bogarnir vóru 10 í tali, og talan var um størsta ídnaðarprojekt í Føroyum

3 Leiðandi verkfrøðingurin Hroar Halvor Sørensen dokumenteraði sjálvur byggingina við myndatøkum. Hroar var 24 ára gamal, tá ið hann stóð fyri byggingini. Sonur hansara hevur latið siloprojektinum mongu myndirnar, sum vórðu tiknar

4 Arkitekturin var franskur men byggifirmaið var C. G. Jensen úr Keypmannahavn

5 Her liggur ein saltdampari undir siloini. Fyrstu ferð, siloin stóð sína roynd, var 8. februar 1939, tá ið sluppin Godthaab, sum a/s N. J. Mortensen átti, sum fyrsta fiskiskip keypti salt frá siloini. Tað arbeiði, sum fyrr tók tveir dag, tók nú bert ein góðan tíma. Eitt risa framstig fyri eina føroyska ídnaðarfyritøku.

6 Sluppfiskiskapurin tók seg upp í 1870unum og smátt um smátt kravdust stórar nøgdir av salti til saltfisk og klippfisk. Og so hvørt sum fiskiflotin varð nýtímansgjørdur kravdust størri nøgdir av salti.

# Salt í **sárið**

***Konsert verður í Saltsiloini leygardagin 15. mai frá klokkan 18.30. Hesi fara at spæla: Cantabile, Havnar Hornorkestur, Martin Joensen, Oniontree, Hallur Joensen, Crawling Blue og Sámal Ravnsfjall, Deiggj, Brandur Enni og Tróndur Enni, Tinganest, Harkaliðið, Jens Marni Hansen, Eivør og Mpiri, Teitur og Mpiri, Frændur og Terji Rasmussen.***


*Sjálv siloin skal varðveitast sum eitt stórt rúm, men byggjast skal upp í við tveimum byginginum út frá síðuni*


*Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, handara Ólavi Rasmussen, formanni í Saltsilogrunninum endaliga góðkendu viðtøkurnar fyri grunnin*



stigtakararnir vilja ikki siga so nógv ítøkiligt um, hvussu langt hetta arbeiðið er komið.

Fyrstu skitsurnar av nýggju siloini eru gjørdar, og onkrar av teimum kunnu vit vísa tykkum her á síðunum.

- Vit vóna, at vit kunnu siga nakað ítøkiligt um fíggingina av saltsiloprojektinum innan ov leingi, men eg kann siga so mikið, sum at tað er gongd í hesum arbeiðnum, og at tað vónandi verður nakað spennandi at frætta í næstum, sigur Ólavur Rasmussen, sum hevur verið við í arbeiðnum við saltsiloini, síðani tað byrjaði.

Mett verður, at tað kostar einar 80 milliónir krónur at byggja nýggja mentanardepilin í Suðuroynni.

- Frá tí at detailprojekteringin byrjar, til húsið stendur liðugt, ganga tað umleið 3 ár, sigur Ólavur Rasmussen.

Men ljós verður varpað á stóru ætlanina við konsert í siloini um eina viku. Tá fara kendir føroyskir tónleikarar at syngja og spæla á einari drúgvari konsert, sum byrjar tíðliga á kvøldinum.